Viljorm Kornus

1. Keisarin situr í hásæti
við knektum sínum og sveinar:
tá var eftir av hansara kempum
Viljorm Kornus og Einar.

*Ríða teir út av Fraklandi*
*við dýrum drós í sað'l,*
*blás í hornið Ólivant í Runsival.*

2. Keisarin situr í hásæti
við knektum sínum og jallum:
talar so til Viljorm rádna:
»Grána tekur tín skalli.

3. Grána tekur í høvur títt,
elli tekur at boyggja:
Tá vit stóðu í heidnum stríð,
tá var mong blóðug troyggja.«

4. Viljormur stóð frá borði upp
og út av borgini gongur:
»Vita tað, keisarin Karlamagnus,
eg tæni tær ikki longur!

5. Nú er tíð til frið at venda,
kasta jarn og stál:
Eg gangi meg í klostrið inn
at bøta mína sál.«

6. Vreiður var hann Viljormur,
hann gekk av høllini út;
eftir sat keisarin Karlamagnus
bæði við sorg og sút.

7. Abbatin stendur á klostraborg,
hyggur hann út so víða:
»Eg sær Viljorm, keisarans kempu,
her mót klostrinum ríða.«

8. Abbatin stendur í klosturdurum,
reyðan ber hann kinn:
»Hoyr tú, Viljormur, keisarans kempa,
vilt tú í klostið inn!«

9. »Tung man vera sorgin tann,
sum ofta hjartað bindur:
eg gangi mær í klostrið inn
at bøta mínar syndir.«

10. Har brast eingin dagur út,
teir hoyrdu ei klokkur ringja:
Viljormur lærdi í klostrinum
bæði at lesa og syngja.

11. Abbatin talar til Viljorm rádna
alt foruttan ekka:
»Tú skalt fara í staðin inn
at keypa mat og drekka!«

12. »Hoyr tú, abbatin, klosturhøvding!
hvat vilt tú mær ráða?
vil nakar taka mær førslu frá,
tori eg hann at sláa?«

13. »Tú skalt halda klosturboð,
sum allir munkar fáa:
meðan tú hevur títt brókabelti,
mást tú ongan sláa!«

14. Viljormur tekur ein fingurring,
hann setir í beltið inn:
So fór hann við rossinum,
so ivrugt var hans sinn.

15. Viljormur keypti mat og drekka
og legði á rossið fríða:
Røvarum møtti á miðjari leið,
hann mátti ei mót teim stríða.

16. Tjóvar tóku mat og drekka,
har var einki eftir:
Viljormur hugsar við sjálvum sær:
"Ei verða munkar mettir."

17. Viljormur rópar á tjóvarnar:
»Tit eru dølskir menn!
Tit hava tikið tað ringasta,
tað besta er eftir enn.

18. Síggja tit henda reyða ring,
í mínum belti situr:
Meiri er hann verdur nú,
enn alt tað, ið rossið flytur.«

19. Tjóvarnir løgdu á Viljorm hond,
tey spenni sundur stukku:
Slitu teir av honum brókabelti,
sær sjálvum til ringa lukku.

20. Viljormur treiv um rossatjógv,
so er sagt herfrá:
Rykti hann tað úr kroppi út,
sum tað hevði verið strá.

21. Viljormur sló við rossatjónum
fast av miklum móði:
Niður slerdi hann tjóvarnar,
teir deyðir á vølli lógu.

22. Viljormur sankar førslu saman
í tí sama sinni:
tá ið hann kom at klostrinum,
tá var eingin inni.

23. Viljormur reikar um borgina,
grimt var honum í huga:
»Her er eingin Guds friður inni,
ei munna munkar duga.«

24. Viljormur gekk allan dag,
maðurin var hann prúði:
Hitti so fram á húsið eitt,
har Grímur á skógum búði.

25. »Hoyr tú, Grímur, góður maður
má eg hjá tær vera:
Alt tað góða, sum eg formár
tað vil eg tær gera.«

Gunnleygs kvæði

1. Vilja tit lýða og ljóð geva mær,
mong eru dømir von:
bóndi búði á Borgum vestur,
Torstein Egilson.

Drívur døggin í lund,
grætur gøvugt sprund,
frægir njóta banastund
á frúar fund.

2. Vænur er hann og vøkstraligur,
skortar honum ei fæ,
átti Jófrið Gunnarsdóttur,
so er sagt fyri mær.

3. Torstein vaknar av blundi upp,
telur dreymum frá:
»Fagra sá eg okn sita
Borgar mønu á.

4. Fagra sá eg okn sita
Borgar mønu á;
ein fleyg ørn undan jøkilstoppum,
settist henni hjá.

5. Onnur kom av suðurlondum;
elvist nú meiri kvíða;
brustu saman í bardagar
um okninа ta fríðu.

6. So fell teirra fundur út
í tí eljustríði:
eftir situr oknin ein,
ørnir lótu lívið.

7. Eftir situr oknin ein,
ber um hjarta trá,
tá kom falkur vestan landa,
flutti hana Borgum frá.«

8. Svaraði tá hin lítli kall,
kønur í rúnarstreymi:
»Eg veit nakað fyrilit
at greina frá tínum dreymi.

9. Tað tær droymdi okn eina,
satt eg sigi frá:
tað er Jófrið, kona tín,
so væna dóttur á.

10. Tað tær droymdi ørnir tvær
í so hørðum stríði:
tað ber fyri dóttur tíni
biðlar lata lívið.

11. Biðlar lata sítt unga lív,
tí ber moyggin sorg;
tá man koma garpur av garði,
ið hana flytur av Borg.«

12. Torstein snuddist til hallar heim,
ei mundi ilskan tróta:
»Verður mær konu moybarn eyðið,
lív skal tað ei njóta.«

13. Svaraði Torstein Egilsson,
og vreiður var hann tá:
»Barnið skal setast í oyðimørk;
tað lív ei njóta má.«

14. Torstein búðist á altingið,
frá man frættast víða;
frúgvin fell á tiljubekk,
hon føðir moy so fríða.

15. Jófrið krevur sín sendisvein,
í loyndum við hann røddi:
»Tú skal ríða í Herðarholt
til Torgerð Egilsdóttur.

16. Tríggjar merkur í hvítum silvri,
tað skal vera títt;
tú bið hana Torgerð í Herðarhold
fostra barnið mítt.«

17. Honum eingin á leiðini fylgdi
nimma fuglur við veingi;
Torgerð tók tað lítla kind
og fostraði tað so leingi.

18. Lidnir vóru vetrar seks,
Torstein mundi tykja:
»Nú skal ríða í Herðarholt
systur mína at vitja.«

19. Dagurin tók at kvølda;
kátir drekka vín;
tað er Torgerð Egilsdóttir,
skeinkir fyri bróður sín.

20. Moyggjar leika um hallargólv,
kappin á man líða;
ein ber yvir øllum teim,
tað er Halga fríða.

21. »Hoyr tú, sæla systir góð:
tær er lagað gávan;
aldrig sá eg vænari barn
fyri mínum eygum báðum.«

22. »Minnist tú, Torstein, bróðir mín,
so ungur tú teg østi?
Nú er ei so undarligt,
tó tú ber blóð í brósti.

23. Tað mælti tú undan tingreið tíni,
tá Jófrið á songum lá:
flytið mítt barn á oyðimørk!
Tað lív ei njóta má.

24. Flutt var mær tað lítla kind
higar heim til hallar;
tað er Halga dóttir tín,
ið høvur ber yvir allar.«

25. »Takk fái tú, systir mín,
fyri barna-goymslu tína!«
Glaður reið Torstein Egilsson
aftur við dóttur síni.

26. Halga vóks í faðirs garði,
ljós er hon um enni,
eingin er hon á Íslandi,
ið líkist aftur at henni.

27. Halga vóks í faðirs garði,
høvdu tað menn á orði;
hennar var hár á herðar sítt
sum silkistakkurin skorin.

28. Illugi svarti á Gilsbakka,
tikin til góðar at evna,
átt hevur hann ein ungan son,
Gunnleyg skulum vær nevna.

29. Gunnleygur eitur hann Ormstunga
- hann kann væl brøgdini fleiri -:
tungan snjøll og svørðið snarpt,
ilt er skap at eira.

30. Gunnleugur gongur for faðir sín,
mælur um sín vilja:
»Lána mær farm og ferju frítt;
nú lystir meg út at sigla.«

31. »Hvar skalt tú til ferðar venda?
Tað er meiri vandi:
tú siðar teg ikki í faðirs garði,
hvaðna minni úr landi.«

32. Gunnleygur gongur í búrið,
farmin út at kasta.
Illugi treiv um vørukippur,
aftur í lási læsti.

33. Gunnleygur rýmdi av Gilsbakka,
bæði við sút og sorg,
støðgaði ikki ferðini
fyrr enn niðri á Borg.

34. Torstein tók mót honum væl
setti sær mannin hjá:
»Dvølst tú her og ver hjá mær
í meðan so stundar á!«

**Sigmunds kvæði eldra**
**el. Sigmund Brestissons tættir**

*Fyrsti táttur*

1. Í Noregi býr ein menskur mann,
Ólavur Trygvason heitur hann.

*Noregis menn, dansið væl í stillum,*
*stillið tykkum allar,*
*riddara, Noregis menn,*
*dansið væl í stillum.*

2. Ólavur kongur kristnum býður,
gud og mildar misskunnar tíðir.

3. Ólavur heitir á sveina tvá:
»Heimtið mær Sigmund inn til vár.«

4. Áðrenn teir høvdu hálvtalað orð,
tá var Sigmundur inn fyri borð.

5. Sigmundur fellur á síni knæ:
»Krist signi teg, harri, hvat viltú mær?«

6. Kongurinn tekur í Sigmundar hand:
»Eg gevi tær helming av Føroyja land.«

7. »Tú skalt fara til Føroyja vestur,
tær skal fylgja Tangbrand prestur.

8. Í Føroyjum býr ein finskur mann,
Tróndur í Gøtu heitur hann.

9. Tróndur í Gøtu heitur hann,
mín kæri Sigmundur fá mær hann.«

10. Sigmundur tekur til orða svá:
»Hann verður ikki góður at fá.«

11. »Hvørt heldur er hann tann kappinn reysti,
ella er hann í gívrum treystur?«

12. »Ikki er hann tann kappinn reysti,
heldur er hann í gandi treystur.«

13. Ganga teir eftir sandi,
sum knørrur fleyt fyri landi.

14. Teir loystu út av dýrum vág,
tann besta knørr, í Noregi lá.

15. Sigmundur sínum skipi skeyt;
besti knørrur av Noregi fleyt.

16. Sjógvurinn brýtur sum boðafles:
haldum beint í Líðandisnes.

17. So siglir Sigmundur breiðan fjørð,
til Gøtu var teirra heimangerð.

18. Hann siglir í dagar, hann siglir í tvá,
hin triðja fekk hann Føroyjar at sjá.

19. Sjógvurinn brýtur í streymi stritt,
einki aktar Sigmundur slíkt.

20. Sjógvurinn brýtur sum boðafles,
haldum beint á Mjóvanes.

21. Sjógvurinn gerst nú gulur og blár,
sandurinn uppi á tilju lá.

22. Tá tekur at rjúka sandur og sjór:
»Nú er Tróndur vorðin óður.«

23. Náttina eina, dagana tvá,
Sigmundur út fyri Gøtu lá.

24. »Tó at vær kostum lív og and,
vær náum ei á Gøtu sand.

25. Vær náum ei á Gøtu sand,
Tróndur ristir móti oss gand.

Brestis kvæði

1. Árla var um morgunin,
sólin roðar í hav,
Beinir gekk í skálan inn,
sum Brestir sterki svav.

Treðum lættliga dansin!
Dagurin skín so fagurliga,
komið er hægst á summarið.

2. »Statt upp Brestir, bróðir mín!
sól í skorar gyllir,
eingin blæsur vindur á vág,
og sjógvurin er stillur.

3. Lít tær út á Lítlu Dímun,
har hvítir ei við tanga,
aldri fæst ein betri dagur
bjargaseyð at fanga.«

4. Tóku bond og bjargalínur,
gyrdu svørð við belti,
gingu so til strandar oman,
dreingir tveir teir eltu.

5. Mælti tað Sigmundur Brestisson,
vetrar var hann níggju:
»Eg skal út á Lítlu Dímun
hin villa veðr at síggja.«

6. Svaraði Tórir Beinisson,
á tólvta ári var:
»Faðir, fert tú á Dímun út,
lat meg fylgja tær!«

7. »Hvat skulu tit á Dímun gera,
har eru stíggir trongir,
langir eru teir loftskútar,
og lágir eru tit dreingir.«

8. Svaraði Sigmundur Brestisson,
snimma vaks hans hugur:
»Hann, ið alist við øsku inni,
lítið í leikum dugir!«

9. »Satt hann sigur, sonur mín,«
Brestir tók til orða,
»eingin skal hjá ungum alva
bragdarhugin forða.«

10. Tóku bát úr tøttum neysti,
rangt var teimum sjógvað,
dreingir settust á rengur niður
og høvdingar at rógva.

11. Løgdu teir at oynni inn,
bátin upp teir drógu,
gingu so í bergið fram,
sum brattar rásir lógu.

12. Fótafimir og klófastir,
óttaðust ei nakað,
lupu lætt um leysar upsir
styggan seyð at taka.

13. Fimm hundrað av áseyði
Lítla Dímun bar,
svart var alt sum kolamógvur,
eyðkent slag tað var.

14. Stygt og kvikt sum villur fuglur,
vártreyst út av lagi.
So er sagt, at Hvalbingar,
teir tóku av alt slagið.

15. Tykir mær tað harmiligt
at fara so um fæ;
fyrnsta seyð, í Føroyum var,
meg lysti enn at sæð.

16. Fullvæl dugdu høvdingarnir
vargaseyð at veiða,
gingu so at báti oman,
fongin við sær leiða.

17. Hildu fram at Stóru Dímun,
vildu vinna heim,
síggja trinnar miklar skútur
sigla móti teim.

18. Albrynjaðar tríggjar tylvtir
taldu teir á førum;
glitra spjót og gyltir hjálmar,
sólin skein á svørðum.

19. Brestir mælir orðum hátt,
gott var í honum evni:
»Fullvæl kenni eg seglini
og gylta drekastevnið.

20. Hoyr tú Beinir, bróðir mín!
hvat ráð skulu vit taka?
Hasir eru garpar teir,
ið okkum ætla at saka.

21. Fyrstur siglir Havgrímur,
og síðan Gøtutróndur;
áðrenn økt at enda er,
elvist leikur óndur.

22. Fyrstur siglir Havgrímur,
og síðstur siglir Bjarni;
áðrenn sól í havið setir,
blóðgast okkurt jarnið.

23. Skjótt so ber teir sjóvarfallið,
lagnan gerst so skeiv,
náddu vit at Rakhellu
og komu upp í Kleiv.

24. komu vit í stíggin upp,
vit kundu hann væl verja,
høgdu niður hetjur tær,
ið tordu á at herja.«

25. Svaraði hartil Beinir sterki,
í royndum var hann góður:
»Vit skulu halda at oynni inn,
og taka ein harðan róður.

Gorplandskvæði

1. Eg veit eina rímuna,
gjørd við nítum orðum
um hann Úlv á Gorplandi,
sum kongur var í forðum.

Væri eg í brendu brókum mínum,
illa man frúgvin tola meg
í skarlekssokkum sínum.
Væri eg í brendu brókum mínum.

2. Úlvur eigur ta borgina,
stendur á borgartanga,
tílíka hava tit onga sætt,
hvørki stutta ella langa.

3. Hon er øll við gróti sett,
grøn sum Gorplands eingir,
har eru byrsur og banarør
og bæði svørð og stangir.

4. Úlvur gongur á borgini,
heldur seg so spakan:
»Vita tit nakran føddan vera,
ið borgina torir at taka?«

5. Tí svaraði Kuril jall,
hann lyftir upp sínar hendur:
»Herjar nakar á Gorplandsborg,
so verður hann afturvendur.

6. Tað svørji eg við mína trú
og við mín tummil langa,
herjar nakar á Gorplandsborg,
tað skal honum illa ganga.«

7. Mælti tað Úlvur, reysta kempa,
stendur í brynju grá:
»Sjálvur skal eg á odda ganga,
tað stendist hvat av í má.«

8. Baldur býr á Sjólondum,
hann talar til sínar dreingir:
»Hvar vita tit mín javnlíka,
tað havi eg hugsað leingi?«

9. Svaraði ein av Sjólandsmonnum,
klæddur var í lín:
»Úlvur kongur av Gorplandi
er yvirmaður tín.«

10. Úlvur eigur ta borgina,
stendur á borgartanga,
tílíka hava tit onga sætt,
hvørki stutta ella langa.

11. Hon er øll við gróti sett,
grøn sum Gorplands eingir,
har eru byrsur og banarør
og bæði svørð og stangir.«

12. Baldur heldur á hallardyr,
hann talar til sínar garpar:
»Nú lystir meg til Gorplanda
at royna tann kongin snarpa.«

13. Gingu teir til strandar oman,
ríkir menn og reystir,
lunnar brustu og jørðin skalv,
teir drógu knørr úr neysti.

14. Settu segl á hvørja stong,
knørrur tók sjógv at klúgva,
so var skútan ferðarmikil,
rætt sum fuglar flúgva.

15. Sigldu teir í dagar,
sigldu teir í tríggjar,
tað var tann fjórða morgun,
teir mundu Gorpland síggja.

16. Baldur eftir bunka gongur
við sínum hjarta balda:
»Vit skulu ikki at borgini fyrst,
men norður um landið halda.«

17. Baldur sigldi um landið norður,
hann var ikki um seg ræddur.
Sama dag var gamli pávi
úti á havi staddur.

18. Pávin situr í sínum báti,
klæddur var í roð:
»Heilir og góðir mínir menn,
eg geri skipaboð!«

19. Svaraði Markus Skeiteyga,
hann leit seg upp til skýggja:
»Hatta man vera eitt ófriðarskip,
tað kann eg væl síggja.«

20. Svaraði Gunnar Stamigukkur
við sínum hjarta blíða:
»Lagt skal vera at hasum knørri,
vita, hvat hann man týða.«

21. Pávin situr í sínum báti,
hevur nú fánarorð:
»Vitið tað, allir mínir menn,
so leypi eg fyri borð!«

22. Svaraði ein av pávans monnum,
heldur at tí látur:
»Hví ert tú so ræddur í dag,
tú plagar at vera so kátur?«

23. Baldur gongur eftir bunka fram
við silvurspentan fót:
»Eg síggi bát eftir havi koma,
hann rør mær í mót.«

24. Baldur so til orða tók,

so lættur var hans andi:
»Hoyr tað, tú hin fremmandi maður,
hvussu stendur til á landi?«

25. Svaraði Gunnar Stamigukkur,
hann var kallmansmaki:
»Úlvur kongur á Gorplandi
hann drepur oss allar í raki.«

Grái táttur

1. Tað var um eina miðja nátt,
mánin í Gøtu skín.
Líggjas vaknar í sínari song,
hann fram á gólvið trín.

Nú siglir Líggjas
við sín fríða knør
fyri Klakk og Gøtunes
at verja bóndans jørð.
Nú siglir Líggjas.

2. Talar hann á ein lítlan svein,
Lias Sofus tey kalla:
»Kynd tú vita á Mjóvanesi,
á Tyrli og Støðlafjalli.«

3. Bøndur sóu vitarnar,
á Eysturoynni brunnu;
kirkjubømenn og nólsoyingar
hvørr um annan runnu.

4. Nú var ei at dvølja á føti,
hildurshanar láta.
Kvittaðu so til Gøtu norður,
moyggjar og møður gráta.

5. Kvitta teir til Syðrugøtu,
har skal fylkjast liðið;
summir sigldu, og summir róðu,
aðrir runnu og riðu.

6. Líggjas greiðir kappum frá,
lýsir miklan vanda:
»Kongsins menn og sendiboð
á Myrkjanoyri standa.

7. Her er komið bræv og boð
við posti norðan úr Bø:
Teir skulu taka eitt runudíki
frá Hans á Biskupsstøð.«

8. Tað er henda sama morgun,
Líggjas býðst til ferðar,
Norskulóg í hondina
og Gráubók um herðar.

9. Tá ið hann fór av durum út,
hann heilsar síni frú:
»Hann skal mangur bleikur liggja,
í morgin ríður av búð.«

10. Gongur hann til strandar oman,
kappar í hølum floymdu;
rívur hann upp tær neystahurðar,
ið bóndaknørrin goymdu.

11. Tóku teir út bóndaknørrin,
út í kláran dag;
tá vaks gras á barkanum
og mosi á hvørjum knæ.

12. Líggjas leggur í bátin inn
skjáttu við ferðarmati,
veðrasperil til nøglu setur.
Slíkt er bóndalæti.

13. Flota teir ta snekkjuna
fyri Gøtusandi,
Líggjas leypur í eystrið inn,
hinir standa á landi.

14. Líggjas tekur til orða svá,
hann lítur á saltan flógva:
»Her kemur eingin innanborða,
ið ei kann trúskap prógva.«

15. Tekur hann upp ein slíðraknív
við so lítið ljóð;
sker hann seg í armin sín:
»Vit skulu blanda blóð.«

16. Fyrst trein fram ein gamal maður,
nevndi seg Jóannes jall:
»Vit hava áður blandað blóð,
nú skulu vit blanda gall.

17. Geip so eitur mítt góða svørð,
søkt í fjalli inni;
manga hevur tað skilamann
skilt við vit og minni.«

18. Fram steig Páll í Kirkjubø,
hann heldur á blástum kíki:
»Eg eri royndur í mongum vási,
eingin er mín líki.

19. Eg bar jarn á Dannebrog,
tá bliknaði mangur skalli;
sterka Dánjal í Seyrvági
eg tók undir Skælingsfjalli.«

20. Tekur hann upp ein slíðraknív
við so mikið gaman,
sker hann seg í armin sín
- so væl runnu sveitar saman.

21. Næsti maður úr flokki trein,
hann bar stav í hendi:
»Eg eiti Jóannes Danielsen,
borin á brøttum lendi.

22. Tá ið eg fór av Velbastað,
tá bjóðst eg ei við frið,
svørðið hjá Ívar Beinleysa
eg spenti við mína lið.«

23. Tekur hann upp ein slíðraknív
við so lítið gaman,
sker hann seg í armin sín,
men ei runni droyrar saman.

24. Tá gerst Líggjas ógvisligur:
»Her er svikaferð!«
Maðurin biður fyri sær,
hann innanborða er.

25. Triði maður úr flokki trein,
hann bar spenni við knø:
»Í víggi eiti eg Managarmur,
doyptur Pætur á Trøð.

Oddvalds ríma

1. Árla var um morgunin,
sólin roðar í fjøll,
teir síggja eina so mikla kempu
ríða av Garsia høll.

*Ríða teir út av Fraklandi*
*við dýrum drós í sað'l,*
*blás í hornið Ólivant í Runsival.*

2. Árla var um morgunin,
sólin skein so víða:
teir síggja eina so mikla kempu
av Garsia høll útríða.

3. Odvaldur gekk í høllina inn,
kappin tann hin mæti,
hann tók í keisarans hvíta skegg,
og lyfti hann upp úr sæti.

4. Eim og eld tað bað hann goysa
undir hans skeggi hvíta,
hann var eingin av Frankismonnum,
ið tordi mót' honum líta.

5. Upp leyp reystur Rólant jall,
vildi ei longur sita:
»Eg skal teg við Dýrindal
for úlv og vørgum brytja.«

6. Svaraði keisarin Karlamagnus,
heldur á gyltum løgdi:
»Eingin skal av mínum monnum
røra honum hár á høvdi.«

7. Tað var keisarin Karlamagnus,
sær seg undan skildi:
»Sig mær, frægur Odvald jallur,
hvat tú higar vildi.«

8. Odvaldur gekk at borðinum,
ljómin av honum skín:
»Garsia kongur krevur teg
skatt av landi tínum.«

9. »Tí fór eg av Garsia høll
við mínar sveinar baldar,
vit vilja skatt av landi taka,
síðani frið at halda.«

10. »Gud lati ei Frakland vera so statt
av sínum snildar bræði,
at eg lúki Garsia kongi
skatt av landa ræði.«

11. Svaraði keisarin Karlamagnus,
heldur á gyltum teini:
»Eg lúki ikki Garsia kongi
skatt av londum mínum.«

12. »Lúkar tú ikki Garsia kongi
skatt av londum tínum,
tá skal keisarin Karlamagnus
tola so harða pínu.«

13. »Tí fór eg úr Garsia høll,
eg geri tað ei at loyna;
síggja vil eg tín systurson
og roysni við hann royna.«

14. »Tí fór eg av Garsia høll
við mínar tríggjar dreingir:
síggja vil eg tín systurson
og vinna sigur av kongi.«

15. Svaraði keisarin Karlamagnus,
alt er betur at snúgva:
»Hvør Gud er tín lánardrottur,
og hvønn Gud viltú trúgva?

16. »Eg trúgvi best á mítt skjøld
og svørð og ringabrynju fríða,
hesin sami búni brandur,
ið prýðir mína síðu.

17. Eg trúgvi á mítt skjøld og svørð
og ringabrynju bjarta,
hesin sami búni brandur,
leskar mínum hjarta.«

18. »Tjúkkur ertú og dreivlorkutur,
tjúkkur ertú um herðar,
illur er tín trúnarháttur,
so illur tín endi verður.

19. Tjúkkur ertú og dreivlorkutur,
seinur ertú í vendi,
ill so er tín átrúin,
og illur verður tín endi.«

20. Inn kom væna keisarans systir,
gull úr hári hekk:
hon fekk hug á Odvaldi,
fyri breiðum borði gekk.

21. Inn kom væna keisarans systir,
gull úr hári hongur:
hon fekk hug á Odvaldi,
fyri breiðum borði gongur.

22. Árla var um morgunin,
dagurin var ljús,
tá var Odvald høvdingin
til síni klæði fús.

23. Tá var Odvald hertugin
til síni klæði fús,
klæddi seg innan høgaloft
við eitt kertuljús.

24. alita dubbar út Odvald jall
bæði við brynju og svørð:
»Tú ger so væl við Rólant jall,
hann ungur av aldri er!«

25. Dalita dubbar út Odvald jall
bæði við brynju og skjold:
»Tú ger so væl við Rólant jall,
tá tú fært hann í vold!«

Herr Lovmand

1. Herr Lovmand red sig under ø;
- *danser I vel, mit skønne unge liv,* -
han fæste stolt Ingerlille, så væn en mø.
*Så måtte hun vorde min.*

2. »Hør I, stolt Ingerlille under ø:
Hvorlænge ville I bie mig mø?«

3. »I otte vintre fulde,
den niende om jeg skulle.«

4. Der otte år forgangen vare,
stolt Ingerlille hun længtes så såre.

5. Stolt Ingerlilles brødre ginge sammen i råd:
»Vi ville gifte vor søster i år.«

6. »Vi ville give hende rige herr Tord;
han ejer mere guld, end Lovmand ejer jord.«

7. »Han har mere guld på brystet sin,
end herr Lovmand har i sit forgyldene skrin.«

8. »Mere guld bær han på hviden hånd,
end herr Lovmand har jord i alle sine land.«

9. »Han har mere gods i arken,
end herr Lovmand har jord i marken.«

10. De drukke bryllup i dage fem,
ikke ville bruden til senge i dem.

11. Den sjette dag ad kvælde,
da toge de bruden med vælde.

12. »Skal jeg nu til senge gå,
da følger mig først til højeloftsbro.«

13. Der hun kom på højeloftsbro,
hendes øjne de stode ad salten fjord.

14. »Hisset ser jeg sejlene gule og blå,
dem syed jeg med mine fingre små.«

15. »Havde jeg mig en fuldtro ven,
did ville ride hen, og snart igen.«

16. »Hør du herr Peder, kære broder min,
rid hen til stranden for søster din.«

17. Herr Peder går i stalde,
han skuer de gangere alle.

18. Han skuer den gule, han skuer den grå
den fejreste lagde han sadel på.

19. Herr Peder rider på hviden sand.
Herr Lovmand styrer sin snekke mod land.

20. »Hør du, herr Peder, staldbroder fin,
hvor lider Ingerlille, fæstemø min.«

21. »Så lider Ingerlille, fæstemø din,
i dag så drikker hun bryllup med sin.«

22. »I syv år lå jeg syg under ø,
det var så ilde, jeg kunne ikke dø.«

23. »Skam så få de vive,
som mig have bedet i live.«

24. »Skam så få de bølger blå,
de ej slog mit skib i stykker små.«

25. »Ti stille, herr Lovmand, hvi vil du dø?
Du finder stolt Ingerlille endnu mø.«

26. »Hør du, herr Peder, staldbroder min,
vil du låne mig grå ganger din?«

27. »Vil du låne mig grå ganger din,
jeg giver dig igen gode snekken min.«

28. Herr Lovmand red og rendte,
sin gode grå ganger han sprængte.

29. Herr Lovmand han kom ikke før,
end de brændte blus for brudehusdør.

30. Herr Lovmand sprang ind og var ej sen:
»Stat, Tord, herude, det du så men.«

31. Herr Lovmand lukte den dør så brat:
»I sige herr Tord så mangen godnat.«

32. »Jeg giver herr Tord kær søster min
med brunen mjød og klaren vin.«

33. »Tolv tønder mjød og tolv tønder most
jeg giver herr Tord til bryllupskost.«

34. Så snart kom bud for herr Tord ind:
»Nu sover herr Lovmand hos unge brud din.«

35. »Sover herr Lovmand hos unge brud sin
da var hun hans, før hun blev min.«

36. »Han sover hos din unge brud
og giver dig igen sin søster prud.«

37. »Han sover hos din fæstemø
og giver dig igen sin søster under ø.«

38. »Så gerne lover jeg hans søster under ø,
som han sover hos min fæstemø.«

39. Nu haver herr Lovmand sin fæstemø væn,
han gav herr Tord sin søster igen.

40. Der var glæde og der var gammen,
herr Lovmand og herr Tord drukke bryllup sammen.

41. Der kom glæde for sorrig igen,
- *danser I vel, mit skønne, unge liv* -
da hver førte selv sin fæstemø hjem.
*Så måtte hun vorde min.*

**Dronning Dagmar**

1. Dronning Dagmar ligger i Ribe sjug,
til Ringsted monne de hende vente.
Alle de fruer, i Danmark ere,
dem lader hun til sig hente.

*Udi Ringsted, der hviler dronning Dagmar.*

2. »I hente mig fire, I hente mig fem,
I hente mig af de vise:
I hente mig liden Kirstin bold,
herre Carls søster af Rise.«

3. »I hente mig unge, I hente mig gamle;
I hente mig af de lærde;
I hente mig liden Kirstin bold,
al ære så er hun værd.«

4. Ind kom liden Kirstin ad dør,
hun skinned så rød af guld;
hun kunne ikke ljuset på krunen se,
hendes øjne vare tårefuld.

5. Liden Kirstin ind ad døren tren
med tugt og favren sinde;
dronning Dagmar står hende op igen,
så vel hun favnede hende.

6. »Kan du læse og kan du skrive
og kan du løse min pine,
da skalt du slide skarlagen rød
og ride på gangerne mine.«

7. »Kunne jeg læse og kunne jeg skrive,
jeg gjorde det jo så gerne.
Det vil jeg for sanden sige,
Eders pine er hårdere end jern.«

8. Det var liden Kirstin bold,
tog bogen og derudi så:
»Hjælpe Eder Gud Fader udi Himmerig!
Eders pine er hårdere end stål.«

9. Hun tog bogen udi sin hånd,
så sørgeligt derudi læste:
»Hjælpe os Krist i Himmerig,
at I Eders liv kunne friste!«

10. Læsten hun tog og den hellige bog,
hun læste alt, hvad hun kunne.
Det vil jeg for sanden sige,
så såre hendes øjne de runde.

11. De fulgte hende ud, de fulgte hende ind,
det lide jo længer jo værre:
»Medens det kan ikke bedre være,
I sende bud efter min herre!«

12. »Vil Gud det have, det må så ske,
og døden stander mig fore.
I sende straks bud til Skanderborg,
I finde min herre der.«

13. Det da var den liden smådneng,
han lod ikke længer forlide,
og han rykte sadel fra bjælken ned
og lagde på ørs hin hvide.

14. Og det da var den anden smådreng,
satte sig til ganger rød.
End red han langt hastiger fnem,
end snaren falk han fløj.

15. Kongen han stander på højelofts bro,
og ser han ud så vide:
»Hisset ser jeg min liden smådreng,
så sørgelig monne han kvide.«

16. »Hisset ser jeg den liden smådreng,
så sørgelig monne han trå.
Nu råde Gud Fader i Himmerig,
hure det monne Dagmar gå!«

17. Ind da kom den liden smådneng,
og stedes han for bord.
Han var snild og kræng i tale,
han kunne vel føje sine ord:

18. »Dronning Dagmar haver mig til Eder sendt,
med Eder hun taler så gerne.
Hun længes både fast og overbrat,
så såre hun monne sig vene.«

19. Dankonning han slog det tavlbord sammen,
så alle de terninger sprunge:
»Forbjude det Gud i Himmerig,
at Dagmar skulle dø så ung!«

20. Der kongen drog af Skanderborg,
da fulgte hannem hundrede svende;
og der han kom til Gribstedbro,
fulgte hannem kun Dagmars dreng.

21. Og der han red over Randbøl hede,
da fulgte hannem femten svende,
men der han kom over Riberbro,
da var den herre alene.

22. Der var stor ynk i fruerskare,
der alle de fruer græde:
Dronning Dagmar døde i liden Kirstins arm
der kongen red op ad stræde.

23. Og det var dannerkonningen,
han ind ad døren tren,
og det var liden Kirstin bold,
hun rakte hannem hånden igen.

24. »Og høre I herre og nådige konge,
I skulle hverken sørge eller kvide;
thi I have fået en søn i dag,
er skåren af Dagmars side.«

25. »Jeg beder Eder alle, jomfruer og møer,
jeg beder Eder hver og alle:
I bede en bøn for Dagmars sjæl,
at hun måtte med mig tale!«